# Louis Louis er sjónbandalag

**Í næstum verður Stay under the stars hjá Teiti útgivin í USA, Kanada og Týsklandi, í hesum sambandi hevur Teitur gjørt sangin Louis Louis til sjónbandalag**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*

Kendi danski rokkmyndamaðurin Martin Dam Kristensen hevur júst lagt síðstu hond á sjónbandalag til sangin Louis Louis hjá Teiti, og hóast sjónbandalagið ikki alment er spælt á sjónvarpsrásum enn, so liggur tað á alnetinum og til ber hjá øllum at síggja lagið á heimasíðuni youtube.com.

Umboðsmaðurin hjá Teiti Christian Ulf-Hansen sigur, at Martin Dam Kristensen er góður vinmaður við bæði seg og Teit. Hann hevur tikið myndirnar til báðar Teitur fløgurnar. Teir hava brúkt hann sum myndamann, tí hann hevur eitt sera gott eyga fyri Teiti, kennir hansara visiónir innan tónleik og kennir Teit. Tí var eisini upplagt at heita á hann um at leikstjórna sjónbandalagið.

Christian Ulf-Hansen sigur at teir eru væl nøgdir við endaliga úrslitið. Vit vildu fegin hava andan í lagnum Louis Louis at koma fram, og hetta hevur eydnast. Hetta sum verður sagt í setninginum "Every living being is a dancer", liggur sum grund í sjónbandalagnum. Hetta er eisini andin á allari fløguni Stay Under The Stars, at vit skulu lata tónleikin frelsa okkum. Í næstum verður sjónbandalagið Louis Louis sent kring allan heim.

5. september verður Stay Under The Stars útgivin í USA og Kanada, og 17. september kemur hon út í Týsklandi. Í sambandi við hesar útgávur fer Teitur á konsertferð í hesum londum.

6. september byrjar konsertferðin í Norðuramerika. Teitur spældi í sambandi við seinastu fløguna fleiri hundrað konsertir í USA, og somuleiðis nakrar í Kanada. Í Kanada var serliga konsertferðin saman við John Mayor væl eydnað, og við hesari konsertferð vann Teitur sær nógvar fjepparar, og síðan tá hevur hann spælt sera væl vitjaðar konsertir ymsa staðni í Kanada.

Teitur var í seinastu viku í Týsklandi og gjørdi samrøður við tónleikafjølmiðlar, í sambandi við útgávuna har. Hetta gekk sera væl og áhugin var stórur. Christian Ulf-Hansen viðgongur, at teir eru spentir um hvussu fløgan fer at klára seg á týska marknaðinum, tí fjølmiðla áhugin er stórur. Teitur brýtur konsertferðina í USA av fyri at fara til Týsklands at spæla nakrar konsertir, m.a. á stóru tónleikamessuni Popkomm.

Seinni í ár eru eisini konsertir í Noregi, Svøríki, Danmark, Bretlandi og Fraklandi á skránni.



*Teitur fer í september á konsertferð í USA, Kanada og Týsklandi*

# Eivør við strúkarum í Tivoli

**Tað verður ein heilt serlig konsert, ið føroyingar, íslendingar og danir í danska høvuðsstaðnum sleppa at uppliva, tá Eivør fer á pallin í konsertsalinum í Tivoli.**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Eivør hevur vunnið sær nógvar fjepparar í Danmark*

Tá Eivør 9. september fer á pallin í konsertsalinum í Tivoli, verður talan um eina heilt serliga konsert, har bólkurin, ið spældi á Kvinnu konsertunum hjá Eivør, Guðrun og Lenu í fjør, og ein strúkarakvartett fara at gera upplivingina til meira enn eina vanliga Eivør konsert.

Tónleikararnir, ið Eivør hevur við sær teljast millum teir heilt góðu í danska kongaríkinum. Á gittara er t.d. Troels Skovgård, ið hevur spælt nokkso fitt við Eivør seinnu tíðina, áður hevur hann samstarva við m.o. donsku songkvinnurnar Hanne Boel og Cæcilie Norby. Á trummum er Klaus Menzer, ið m.a. hevur spælt í Sneakers. Kórrøddirnar verða sungnar av Christine Birksøe og Stine Findsen. Eisini vera fleiri dugnaligir føroyski tónleikarar á konsertini.

Á skránni verða nýggjari og eldri løg hjá Eivør og løg sum Eivør er von at tulka. Fyri at geva fólki eina smakkroynd av, hvussu tað fer at ljóða í Tivoli, hevur Eivør lagt tvær konsertupptøkur av Kvinnu konsertunum í Norðurlandahúsinum á heimasíðu sína. Talan er um løgini Nú brennur tú í mær og Hann angar sum sólja og bøur.

Sigvør Laksá umboðskona hjá Eivør sigur, at fyribils hevur øll marknaðarføringin verði vend móti føroyingum í Føroyum. Men nú verður farið undir at selja konsertina í Danmark. Í vár spældi Eivør eina útselda konsertferð kring Danmark, men tá vóru tað smærri spælistøð, ið vóru á skránni, so talan var ofta um eini 300 fólk, ið komu á konsert. Í konsertsalinum í Tivoli rúmast 1.700 fólk. So tí verður marknaðarføringin eisini munandi ógvisligari enn í vár. M.a. verða risa stór skeltir við Eivør hongd kring býin í Keypmannahavn, umframt at lýsingar verða í donsku bløðunum.

Sigvør Laksá metir tó ikki, at tað verður trupult at selja atgongumerkini, tí í Keypmannahavn búgva hópin av føroyingum og íslendingum og hesir kenna Eivør.

Eivør hevur við sínum heiðurslønum á DMA Folk, og ummælaraóstu framførslum á m.a. Roskilde Festivalinum og á Tønderfestivalinum, eisini vunnið sær nógvar danskar fjepparar, og nógvir av hesum verða ivaleyst eisini at síggja á konsertini í Tivoli.

## Rokk-konsert í Runavík

**Mikukvøldið verður konsert við kunningarstovuna í Runavík við fløguaktuellu bólkunum The Story Ends, The Dreams og 200**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tiltakið er partur av nýggjasta marknaðarføringsátakinum hjá KontoIn, ið er rættað móti ungu kundunum hjá Føroya Banka, har bankin við sms boðum, boðar kundum sínum frá, at tiltøk verða. Sloganið Indian Summer – Heystið er avlýst, hevur í eina tíð verið at sæð kring landið, og nú er greitt hvat talan er um. Á heimasíðu síni sigur bankin: "Gleð teg til eina røð av feitum og óvæntaðum tiltøkum. Hav eygu og oyru opin – og telefonina tendraða – so verður tú kanska boðin við til eitt KontoIN tiltak.

„Indian Summer" er eitt fyribrigdi, ið lýsir eitt stutt tíðarskeið seint á heysti, við lýggjum og sólríkum veðri. Eitt hugfarsligt, róligt ella blómandi tíðarbil, sum kemur tá okkurt líðir móti enda."

Í síðstu viku var fyrsta tiltakið hildið, hetta var eitt Beach Party í Sandagerði við grill, DJ og Beach Volley Í dag kom so næstu sms boðini inn á telefonina:

Feitt tiltak: KontoIn bjóðar til ókeypis konsert við 200, The Story Ends og The Dreams við kunningarstovuna í Runavík mikukvøldið kl. 20.30. Send boðini víðari!



*200 fer at buldra og braka í Runavík*

Mynd: Niels Uni Dam